Galladøgurði, gott lag og fín klæði

GALLADØGURÐI

Sonja Dalsgaard Nolsøe
Annika Hedegaard Isfeldt

Sunnukvøldið var fínur døguriði í Gourmet fyri Hans Blix, konu hansara og øðrum innbodnum. Millum hesi vóru stjórarnir í fyritøkunum, sum hava verið við til at fingið fyrrverandi amerikanska forsetan Bill Clinton til Føroya og sjálvandi løgmaður. Hóast veðrið uttanfyri ikki var av tí besta, var lagið gott, og prátið gekk flótandi í matstovuni.

Allir gestirnir vóru væl klæddir, og fleiri fín merkir vóru at síggja hetta kvøldið. Tað, ið serliga eyðkendi kvøldið var tann svarti liturin og pløgg frá m. a. Tone Barker og Klivanum.

Vakurt var dekkað upp í fínu matstovuni Gormet sunnukvøldið, har stjórarnir í fleiri av stóru føroysku fyritøkunum ótu saman við Hans Blix

Myndafólk: Sunva Eysturoy Lassen

Løgmaður og kona hansara vóru sum altíð sera snøgg. Anita var í einklum klæðum úr Margaritu. Eftir at hava tosað við konuna, finnur Jóannes útav, at klædningur hansara allar helst er úr Wien, men hann minnist ikki júst, hvat merkið er

Myndafólk: Sunva Eysturoy Lassen

Marner Jacobsen, forstjóri í Eik Banka, hevði konuna Morid við til kvøldið. Bæði vóru í svørtum klæðum við einum twisti. Svarti kjólin hjá Morid er frá Tone Barker. Traditionelli klædningurin hjá Marner verður peppaður upp av ríputa reyða slipsinum

Myndafólk: Sunva Eysturoy Lassen

Janus Petersen, sum er stjóri í Føroya Banka, var eins og allir hinir mennirnir í einum svørtum traditionellum klædningi. Janus hevði konuna Margret við. Margret, sum altíð hevur eitt smíl á varrunum, lýsti upp við heilt at víkja frá tí svarta mótanum hetta kvøldið. Hon var í einum vøkrum ljósareyðum kjóla frá Tone Barker og stivlum frá Bruno & Joel.

Myndafólk: Sunva Eysturoy Lassen

Stjórin í Kaupting Bank, Petur Holm, hevði snøggu konuna við. Bæði fylgdu tey rákinum í kvøld við tí svarta litinum. Frida var í einum modernaðum svørtum ballón-kjóla frá Pede og Stoffer, og við sær hevði hon eina tasku frá kenda merkinum Burberry.

Myndafólk: Meg Mulloy

Klæðini hjá snøgga parinum Kahlu og Rúna Hansen riggaðu sera væl saman hetta kvøldið. Bæði vóru í traditionellum svørtum klæðum, og reyði liturin gekk aftur í tilhoyri teirra. Kjólin hjá Kahlu er úr London, og reyða indiska pashminasjallið er úr Kashmir

Myndafólk: Sunva Eysturoy Lassen